




Herðaklappið:

# - Hetta havi je slett ikki fortjent

Anna Kirstin Thomsen fekk herðaklappið fyri stóra arbeiðið hon hevur gjørt fyri tónleikin og tónleikararnar á Seglloftinum á Tvøroyri.

- Oyjøssu Kristi navn, hetta er mestsum ovmikið. Eg eri heilt rørd, og hetta haldi eg slett ikki, at eg havi fortjent, var fyrsta viðmerkingin á rungandi suðuroyarmáli frá Onnu Kirstin Thomsen, sum fekk ársins Planet herðaklapp.

Hon helt eisini, at tað var heilt ótrúligt at verða bólkað við øllum teimum evnaríku tónleikarunum, sum eru í Føroyum.

- Eg eri ótrúliga stolt av okkara unga, evnaríka fólki. Fleiri av teimum hava eisini verið her suðuri og spælt, og tey eru øll líka fitt at hava við at gera, sjálvt um tey eru ymisk.

- Tað er fantastiskt fyri eina gamla hønu sum meg at vera saman við ungdóminum. Eg elski tað. Og eg eri djúpt beærað fyri hendan heiðurin. Eg eri himmalglað fyri hetta, segði Anna Kirstin umvegis telefonina.



## Grundgevingin fyri herðaklappinum:

Serstaka planet-virðislønin varð í ár latin Onnu Kirstin Thomsen av Tvøroyri.

Anna Kirstin hevur av sínum eintingum stríðst leingi fyri nýggja mentanarhúsinum "Segloftinum" á Tvøroyri, har tað hevur verið sera stórt virksemi. Har hava verið hópin av konsertum og øðrum mentanarligum virksemi, umframt at húsið eisini er eitt ungdómshús.

Hetta er heldur ikki bara eitt hvørt hús, men ein sonn perla og helst nógv tað besta spælistaðið í landinum. Anna Kirstin gjørdi eisini gamla handilin hjá Thomsen á Tvøroyri um til tað tey kallað "Pubbina". Hetta er eitt sera hugnaligt stað, sum eisini hevur rúmað hópin av mentanarligum tiltøkum.

Tað er eisini vert at hugsa um, at hon hevur megnað at gjørt hetta á Tvøroyri, sum annars hevur verið ein mentanarliga stein deyður býur rættiliga leingi.

Anna Kirstin vann eisini M. A. Jacobsens virðisløn í ár fyri mentanaravrik sítt.

## Planet awards aftur komandi ár

Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, var ikki í iva, tá hann var spurdur, um vit aftur kunnu vænta okkum eina Planet-handan komandi ár.

-Ja, vit hava longu sett ein bólk at arbeiða við tiltakinum komandi ár. - Tiltakið byrjaði uppi á Hotel Føroyum, har vit høvdu tað tvey ár á rað. Ì fjør fluttu vit tað oman higar í Miðlahúsið, mest sum eina neyðloysn, og í ár var tað aftur ein neyðloysn at hava tað her niðri, greiðir Jonhard Hammer frá.

Men komandi ár verður tað vónandi aftur eitt stórt tiltak.

- Tað hevur stóran týdning at geva tónleikarunum eitt herðaklapp og at heiðra tey bestu. Hetta er gott promotion og gevur mót til at taka tónleikin næsta stigi eisini, sigur stjórin á Rás2.